# Seglið er dreymurin um góða lívið

*Týsdagin kom sera forvitnisligt skip á Havnina. Umborð er norðurlendsk bátaframsýning, ið er meira enn bert framsýning, tí talan er um forvitnisliga heildarupplivingi. Eisini verður skipað fyri ymsum tiltøkum í matstovuni*

DAGFINN OLSEN

Lat tað verða sagt beinanvegin, at øll, ið hava møguleika, eiga at stevna umborð á Nordwest, ið liggur við bryggju í Havn!

At greiða frá framsýningini er ikki lætt, tí talan er um hending, ið skal upplivast.

Tá blaðfólk og myndamaður tygara vitjaði umborð mikudagin, tók Pär Stolpe frá Sjöhistoriska Museet í Stockholm blíður ímóti. Á dekkinum eru stólar og borð og tað sama inni, har café er. Roykurin av matgerð blandast saman við angan av træi, tjøru og bátum, meðan Pär leggur til brots at greiða frá.

Tað serstaka er umhvørvið. At uppliva bátar og søgu umborð á gomlum farmaskipi, ið er bygt í Japan í sjeytiárunum.

Og tað er ikki bert søguna um bátarnar, ið eru sagdar umborð á flótandi sýningini. Dentur er lagdur á at siga alla søguna. Um fólkini aftanfyri. Til hvønn bátin hoyrir søgan um eigaran og fólkini, sum hava nýtt hesar bátar, ið vóru lívstreyt fyri at vinna til lívsins uppihald.

Umframt, at ein dukka ímyndar fólkini, ið hava nýtt bátin, so eru gamlar myndir av fólkunum. Verulig og navngivin fólk. Byrjað verður við Peturi úr Lofoten. Vit fáa søguna um mannin, ið var sjey ár í Amerika fyrst í farnu øld, men sum síðani leitaði heimaftur at finna sær bát og vív.

Har er finska konan, ið rør av oynni og inn á fastlandi, har hon skal í filmshøllina og gamla konan, ið er á veg at selja ull.

Og soleiðis verður hildið fram og við sera viðkomandi og sigandi myndum.

Og umframt bátar og tjøruroyk, so eru eisini ljósmyndir, filmur og ljóð, ið gera heildarupplivingina fullkomna.

At leita umborð á M/S Nordwest er ein ferð á bylgjuni bláu. Ikki bert á Havnarvág í meiri ítøkiligum týdningi, men eisini ein ferð, har leitað verður aftur í søguna og upprunan, ið mangan endar í gloymskunnar havi.

**Seksmannafar**

20 bátar eru á framsýningini. Allir eru teir í uppruna sera meinlíkir, men frábrigdini eru heldur ikki at fara skeivur av.

Millum førini er t.d. báturin frá Oselver, har upprunin til føroyska bátin er at finna. Grundformurin er hin sami. Eintakið á sýningini er bygt í 1880 árunum.

Har er grønlendski kvinnubáturin, sum tó ikki er hóskandi heiti. Veruliga verður hann kallaður stórbáturin og er í veruleikanum farmatbátur, ið mun til veiðubátin hjá grønlendsku monnunum, kajakkin. Stórbáturin er veruliga dømi um hátøkni og verdur at uppliva.

Annars er eisini felags fyri bátarnar og londini, at allastaðni hava tey havt tað, ið verður rópt stórbátur.

Føroyska seksmannafarið á sýningini heldur Pär Stolpe er millum vakrastu førini á sýningini. Báturin er 22 føtur. Hann er smíðaður av Óla Olsen og Símun Johan Samuelsen í Leirvík umleið 1914. Báturin hoyrdi til við Gjógv og hann var sína síðstu útróðrarferð í 1941.

Pär Stolpe hevur longu funnið útav nógvum í samband við føroyska bátin á sýningini, meðan hann hevur verið í Føroyum. M.a. er eydnast at finna útav ymsum viðvíkjandi eigara og fólkunum kring bátin og eisini hevur málfrøðingurin J. H. Winther Poulsen verið og greitt frá ymsum forvitnisligum.

Hóast segl er á ymsum bátum, so er tað í veruleikanum so, at norðurlendski báturin er árabátur. Seglið er dreymurin um góða lívið.

Hetta er 3. árið, at sýningin er á ferð, men eisini seinasta ferðin. Hópur av fólki hevur nýtt møguleikan at vitja umborð og tá steðgað varð í Hetlandi, nýtti 3. hvør íbúgvi møguleikan at vitja umborð.

**Tiltøk umborð**

Sýningin er partur av longri ferð. Vitjað verður í 11 londum og í Føroyum verður steðgað til 12. juni.

Opið er hvønn dag frá klokkan 10 til 20.

Umframt at sýna fram bátar og bjóða okkurt til matna, so eru eisini tiltøk á skráni.

Klokkan 19 í kvøld fer Erling Poulsen at greiða frá og eisini verður harmoniku tónleikur.

Fríggjadagin klokkan 19 er m.a. Tórshavnar Manskór á skránni.



*Føroyska seksmannafarið á sýningini heldur Pär Stolpe er millum vakrastu førini á sýningini*
***Myndir: Álvur Haraldsen***

» *At leita umborð á M/S Nordwest er ein ferð á bylgjuni bláu. Ikki bert á Havnarvág í meiri ítøkiligum týdningi, men eisini ein ferð, har leitað verður aftur í søguna og upprunan, ið mangan endar í gloymskunnar havi* «



*Øll, ið hava møguleika, eiga at stevna umborð á Nordwest, ið liggur við bryggju í Havn*



*Petur úr Lofoten. Vit fáa søguna um mannin, ið var sjey ár í Amerika fyrst í farnu øld, men sum síðani leitaði heimaftur at finna sær bát og vív.*



*Umframt at sýna fram bátar og bjóða okkurt til matna, so eru eisini tiltøk á skráni. Klokkan 19 í kvøld fer Erling Poulsen at greiða frá og eisini verður harmoniku tónleikur.*



# Økismenningarbólkurin havt fyrsta fundin

*Týsdagin hevði økismenningarbólkurin sín fyrsta fund og bólkurin hitti eisini Høgna Hoydal, landsstýrismann. Bólkurin hevur greiðan arbeiðssetning og skal m.a. gera ítøkilig tilmæli til økismenningarpolitikk. Longu 2. oktober skal bólkurin leggja úrslit síni fram*

DAGFINN OLSEN

Høvuðsstaðurin er í vøkstri, meðan onnur øki í landinum standa í stað ella uppliva fráflyting.

Hvussu eru umstøðurnar hjá útjaðaranum og hvat kann gerast fyri at menna økini uttanfyri miðstaðarøkið.

Slíkir spurningar eru alt meira vanligir í gerandiskjakinum. Og undan seinasta løgtingsvali varð kjak um bygdamenning og nýggja hugtakið økismenning.

Sum úrslit av hesum varð fest í samgonguskjalið, at neyðugt var, at økini í útjaðaranum koma fyri seg aftur, eftir kreppuna.

Nýggi økismenningarbólkurin er úrslit av hesi gongd, men sum landsstýrismaðurin Høgni Hoydal nevndi eftir fundin við bólkin týsdagin, so hevur tað av ymsum orsøkum tikið nakað av tíð at fáa bólkin á beinini.

**Stutta freist**

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum er greiður. Bólkurin skal viðgera støðuna og framtíðarútlitini fyri tey ymsu økini í landinum. Samanbera og lýsa fortreytirnar fyri at økini eru í framgongd ella afturgongd - vinnuliga, við fólkasamanseting, við mentanararbeiði o. ø. Bólkurin skal gera ítøkilig tilmæli til ein økismenningarpolitikk.

Longu tann 2. oktober skal bólkurin leggja sína metingar á borðið, so talan er um stutta freist. Umframt metingar og kunning, so var freistin nakað av tí, sum bólkur og landsstýrismaður røddu um týsdagin.

Høgni Hoydal ger í hesum sambandi vart við, at talan er ikki um, at bólkurin skal koma við stórfingnum bóklingi, men við eini frágreiðing, sum skal vera grundarlag fyri politiskum kjaki og aðalorðaskiftinum um evnið í heyst.



*Bogi Mortensen er formaður í økismenningarbólkinum, sum í gjár hevði fyrsta fundin og eisini hitti Høgna Hoydal, landsstýrismann*

Høgni Hoydal er sannførdur um, at avrik bólksins fær stóran týdning fyri landspolitikkin í framtíðini.

Sjálvur metir Høgni Hoydal, at lyklaorð í kjakinum um økismenning er samstarv ístaðin fyri kapping. Hetta er t.d. galdandi millum kommunur. Eisini heldur hann, at neyðugt er at góðtaka høvuðsstaðin sum part av landinum, ið hevur ávísar uppgávur og skipanir, sum ein høvuðsstaður skal hava.

**Stórt arbeiði – stutt tíð**

Bogi Mortensen, vinnulívsmaður í Vági, er formaður í økismenningarbólkinum.

Hann sigur, at nú verður farið undir at gera støðulýsingar av størru økjunum uttanfyri miðstaðarøkið. Hetta á mongum økjum. Vinnuliga, mentanarliga og viðvíkjandi til- og fráflyting. Hagtøl skulu fáast til vega, men sum Bogi Mortensen vísir á, so er trupult at máta eittnú mentan. Tí er neyðugt at tosa við fólk á staðnum, gera lýsingar og skrivligar frágreiðingar.

Spurdur, um ætlanin er at leita eftir orsøkum til, at aftgongd er í ávísum økjum, sigur hann, at er tað so, at ein finnur orsøkina, so ber í hvussu er til at bera so í bandi, at tað sama ikki hendir aftur.

Bólkurin skal koma við ítøkiligum tilráðingum og Bogi Mortensen og limirnir í bólkinum eru samdir um, at fyri framman liggur stórt arbeiði, ið skal gerast upá stutta tíð, tí eisini summarfrítíðin skal havast í huga.

Økismenningarbólkurin er settur saman eftir ymsum fyritreytum, fakliga, vinnuliga og geografiskt.

Í bólkinum eru Dennis Holm, Olga Biskupstøð, Karl Vidtfeldt, Thurid Olsen, Annvør Jacobsen, Axel Nolsøe, Bogi Mortensen er formaður og skrivari er Suni á Dalbø.



*Økismenningarbólkurin. Thurid Olsen, Olga Biskupstøð, Annvør Jacobsen, Suni á Dalbø, Dennis Holm, Karl Vidtfeldt, Axel Nolsøe og Bogi Mortensen.*
***Mynd: Jens Kristian Vang***

# Trøllapætur, Flippan og øll hini

*Bert hálvt ár eftir, at fyrra fløgan kom út, eru Kular Røtur aftur uppá spæl við næstu fløguni. Kular Røtur verða við á fleri stevnum í summar*

DAGFINN OLSEN

Kular Røtur 2 - Túsund Smíl.

Jú, rætt er tað. Longu nú hava virknu og kulu røturnar í Klaksvík givið næstu fløguna út undir heitinum Kular Røtur.

Fløgan er upptikin og ljóðblandað í Studio Pegasus í Klaksvík, har sangirnir eisini hava sín uppruna.

Stentór Rasmussen hevur skriva nærum allar tekstirnar og nøkur løg og skipað fyri. Ingi Isaksen hevur lagt tilrættis, tikið upp, ljóðblandað, forritað og umframt hevur hann eisini gjørt fleiri av løgunum. Ein nýggjur Trøllapætur er eisini á fløguni, sum hann sjálvur hevur gjørt saman við Niclas Hera Jákupsson.

Kápumyndina og tekningar hevur Jógvan á Høvdanum, yngri, gjørt, og tær eru ikki so langt úti. Miðil í Klaksvík hevur greitt húsan til prentingar.

Á húsanum hevur ein villa sníkt seg ímillum. Tað er nevniliga Ingi, ið eigur lagið til Túsund Smíl.

**Konsertir**

Meðan nógv verður prátað um økismenning, so eru røturnar í Klaksvík virknar og arbeiða við fullari ferð, so tónleikur og mentan blóma.

Henda fløgan til børn og ung er eitt dømi um dúgliga virksemið í Klaksvík og í Pegasus. Tvær fløgur við Kulum Rótum uppá einar seks mánaðar. Tað er Kul!

Men á hesi seinnu fløguni eru eisini onnur, enn bert norðoyingar at finna millum sangararnar.Umframt Arnfríð og Rannvá Lútzen, Jógvan Hansen og Trøllapætur, so er eisini ungi Brandur Enni av Tvøroyri millum røddirnar

Manningin í Kulum Rótum takkar fyri mangar kular løtur og góðar konsertir.

Men eisini í summar verða røturnar á palli. Vitjað verður nevniliga á jóansøku, á vestanstevnu og eisini á ólavsøku.

Umframt søkukonsertirnar í summar, so verður eisini arbeitt við at gera ein teknifilm um ommuna, hundin Kingoson, Abbabeiggjan, Trøllapætur, Flippuna og øll hini á Kular Røtur 2 - Túsund Smíl. Filmurin kemur væntandi í heyst.




*Bert hálvt ár eftir fyrstu fløguna, eru Kular Røtur aftur uppá spæl við næstu fløguni*